# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 15**

- Hvar ólukkan eru teir? spyr jólamaðurin forfardur.

Og so má Trølla Omman fortelja Jólamanninum alla søguna. At Leikamafian hevur stolið gávurnar frá jólamanninum og frá fólkunum í bygdini, og at Stampi og Anthonio hava goymt tær inni í skúrinum, og at teir nú sova undir hesum gávum.

- Men hvat hevur tað við tykkum at gera? spyr Jólamaðurin.

- Jógvan og Erling halda, at tað eru vit, sum hava gjørt hesa brotsgerð, sigur Trølla Pætur.

Jólamaðurin skriðar sær í nakkanum.

- Hvat skulu vit gera? Hvussu fáa vit boða Jógvan og Erling frá hesum.



Tað besta var um jólamaðurin fór oman eftir politistinum, meðan trøllini hildu vakt, men jólamaðurin er so mikið illa fyri, at hann orkar ikki. Tey gera so av, at jólamaðurin skal fara inn aftur og leggja seg á sama stað, sum hann lá, og lata sum um hann enn er svímaður. Ímeðan skulu trøllini á ein ella annan hátt fáa boðini oman til løgregluna. Tey so gera. Jólamaðurin fer spakuliga inn aftur og leggur seg aftur. Hann koyrir gávurnar oman á seg, so hann næstan ikki sæst.

Á politistøðini er Jógvan liðugur at skriva frágreiðingina og fer upp gjøgnum trappurnar og yvir til geglið, men til sína ræðslu sær hann, at eingin er inni í geglinum og at Erling situr og svevur.

- ERLING! ERLING! ERLING! ýlir hann.

Erling loypir á føtur - skymast rundan um seg og fær ikki orðið upp, tá hann leggur til merkis, at trøllini ikki eru inni í geglinum.

- ERLING, hvat skal eg gera við teg? Hví ert tú so óbrúkiligur? Eg bað teg ansa eftir trøllinum eina lítla løtu, og aftur hesaferð sveik tú meg. Hvussu býttur og hvussu óbrúkuligur kann man verða?

- Jú men... jú men, kemur tað piprandi úr Erlingi.

- Tað nýttar einki, hvat tú sigur. Tú ert og verður ein persónur, sum man ikki kann líta á. Men her er einki at gera við tað. Skaðin er hendur, og vit mugu út at finna hasi trøllini. Tey eru nakrir stórir bandittar, og vit mugu steðga teimum, áðrenn tey gera meira ónáðir.

- Kom avstað!!!

Og við nógvari ferð renna teir út av politistøðini. Tað fyrsta, teir gera, er at fara niðan til húsini hjá trøllunum, men har er eingin inni. Síðani fara teir oman í bygdina aftur og leita í hvørjum kjallara og hvørjum hjalli. Men har er eingin at finna.

Trøllini standa enn uttan fyri úthúsið hjá Leikamafiuni. Men hvussu skulu tey klára at boða løgregluni frá, at tað er Leikamafian, sum hevur stolið allar pakkarnar.

- Vit kunnu ikki fara oman í bygdina aftur, tí um vit gera tað, so verða vit handtikin beinanvegin. Men hava vit nakran møguleika at fáa politistarnir her niðan, uttan at vit fara oman eftir teimum?

*Puntur 21 til jólakalendaran*







Cadbury

- altíð ein vælkomin jólagestur